FÓLKASKÚLIN

STØDDFRØÐI

Greiðslurokning
9. flokkur

19. mai 2017
kl. 9.45-13.45

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Prov STOVAN

1 Handilsstykki

Ein flokkur við 23 næmingum skal á setursskúla. Túrurin kostar 150 kr. fyri hvønn.

a) Hvussu nógv kostar túrurin fyri allan flokkin?

Tey velja at savna pengar til setursskúlan og fara at savna fløskur. Tey koyra frá húsi til hús og fáa nógvar tómar fløskur, hvussu nógvar og hvat pantið er, sæst í talvuni høgrumegin.

b) Hvussu nógvan pening fingu tey fyri allar fløskurnar?

c) Hvussu nógvur peningur restar í til setursskúlan, tá ið tey hava selt fløskurnar?

d) Hvussu nógv skulu tey gjalda hvør?

1,5 L av sodavatni kostar 29,95 kr. við panti.

Fløskuinnsavnan:

142 stk. alminumsblikk	- pant -	2,00 kr.
187 stk. plastfløskur 0,5 L	- pant -	2,00 kr.
73 stk. plastfløskur 1,50 L	- pant -	4,00 kr.
18 stk. vínfløskur	- pant -	2,50 kr.

e) Hvussu nógv prosent er pantið av øllum kostnaðinum, um vit keypa 1,5 L av sodavatni?

2 Geometri

Eitt vatnglas hevur eitt skap sum ein keylustubbi og rúmar einum $\frac{1}{2}$ litri av sodavatni, sí tekning niðanfyri.

a) Hvussu nógvir cm^3 eru í einum $\frac{1}{2}$ litri av sodavatni?

b) Rokna víddina á botninum á vatnglasinum?

c) Rokna hæddina á vatnglasinum.

1 litur = 1 dm^3

Evnisnøgd:

Glas: 2,3 g/cm^3

Tundur: 0,2 g/cm^3



Vatnglasið vigar 157 gramm, tá ið tað er tómt.

d) Rokna, hvussu nógvum cm^3 av glasi vatnglasið er gjørt av.

e) Hvussu nógv hevði vatnglasið vigað, um tað var gjørt úr tundri?

3 Hagfrøði

Næmingarnir gjørdu eina kanning av teimum innkomnu plastfløskunum.

Kannað varð, hvørji sløg vóru.

K = Kola

S = Sisu

A = Appilsin

H = Hindber

J = Jolly Time

L = Lime

x	t(x)	T(x)	f(x)	F(x)
K	72			
S	36			
A	24			
H	15			
J	27			
L	13			
Tilsamans	187			

a) Ger tíðføristalvuna lidna.

b) Tekna eina stabbamynd av tíðførinum.

c) Hvat er mestið?

4 Tríkantur

a) Rokna víddina á tríkantinum ABC.

b) Rokna longdina á síðuni c.

c) Rokna vinkulin A.

d) Rokna vinkulin B.



5 Kursur og prosent

Anna hevur bílagt eina hettutroyggju á netinum. Troyggjan kostar 29 $.

Kursur:		
USD	$	702,66
GBP	£	858,38

a) Hvussu nógvar krónur kostar hettutroyggjan? (1 desimal)

Ein líknandi hettutroyggja kostar 299 krónur í Føroyum.

b) Hvussu nógvar $ kostar hendan hettutroyggjan? (1 desimal)

c) Rokna, hvussu nógv % hettutroyggjan í Føroyum er dýrari enn hon, sum er bíløgd á netinum. (1 desimal)

d) Hvussu nógv £ eru 125 $? (1 desimal)

6 Blandaðar uppgávur

a) Umstytt framsøgnina: $-2(a + 2) + (a + 2)^2$

b) Ritloys líkningaheildina: $y = -\frac{1}{2}x + 4$ og $y = 3x - 3$

c) Loys líkningina: $\frac{5x-2}{3} + 2 = 8$

d) Rokna longdina AB (reyða linjan). (2 desimal)